Saviola vil aftur á landsliðið

Eftir at hava nýtt stóran part av síðsta kappingarári á beinkinum í FC Barcelona vónar lítli argentinski áleyparin, Javier Saviola, at sleppa aftur á landsliðið, eftir at hann hevur skift felag til spanska kongafelagið, Real Madrid. – Eg havi verið á landsliðnum í langa tíð, og nú ætli eg mær aftur á landsliðið. Tað er eingin ivi um, at Real Madrid er júst rætta staðið at vísa seg fram, og um eg fái spælitíð í Madrid, so eri eg vísur í at sleppa aftur á landsliðið, sigur Saviola. "Kaninin", sum Saviola verður róptur, hevur leikt 36 landsdystir fyri Argentina og hevur skotið 11 mál.

Eiler dømir steypafinaluna

Ovari vøllur í Gundadali leggur graslíki til, tá ársins útgáva av finaluni um Løgmanssteypið skal spælast. Dysturin verður spælur komandi mikukvøld klokkan 18, og eru tað HB og EB/Streymur, ið skulu spæla. Nú er dómarin til dystin eisini ásettur, og tað verður Eiler Rasmussen, sum skal leiða dystin. Hjálpardómarar verða Jens Alberg Simonsen og Andreas Petur Hansen, meðan Lars Müller verður fjórði dómari.

Bæði hava brúk fyri sigrinum

Bæði HB og AB hava brúk fyri teimum trimum stigunum, tá liðini møtast í Gundadali í kvøld. HB fyri at halda fast í hinum trimum oddaliðunum, meðan AB skal sleppa úr botninum

FÓTBÓLTUR

Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Nú er vøllurin í Gundadali blivin klárur, og tí er klárt hjá teimum báðum havnarfeløgunum, HB og B36, at fara í eldin aftur á heimavølli. Um vikuskiftið blivu báðir heimadystirnir hjá hesum feløgunum útsettir, men nú er klárt at fara í gongd við hesar.

Í kvøld skal HB so í eldin á nýggja undirlagnum í Gundadali, tá teir taka ímóti AB. Gongdin hjá hesum báðum feløgunum var ikki tann besta undan summarsteðginum, og tí skulu bæði feløgini royna at broyta hesa gongdina eftir steðgin.

HB, sum av mongum var mett at vera besta boðið upp á ein føroyameistara undan kappingarbyrjan, hevur bert fingið fýra av seinastu 15 møguligu stigunum. Í hálvfinalunum í kappingini um Løgmanssteypið og í evropeisku dystunum hevur HB tó víst rættiliga gott spæl, og tí er líkt til, at teir eru á rættari kós.

Hjá AB sá heldur ikki so gott út undan steðginum. Sjálvt um spælið til tíðir var gott, so endaðu síðstu tríggir dystirnir við tapi, og hetta ger, at teir nú liggja átta stig frá bjargingini við einum færri dysti enn KÍ. AB hevur tó víst, at teir kunnu spæla upp ímóti øllum hinum liðunum í Formuladeildini, og seinasti dysturin, teir vunnu, var ímóti B36, sum liggur á øðrum plássi, so kanska teir eisini fara at leypa ein hvøkk á HB.

HB uttan liðskiparan

Hjá HB er tað sjálvandi ein dyggur smeitur, at liðskiparin, Jákup á Borg, ikki verður við. Hann hevur leingi drigist við ein skaða, og úr HB verður sagt, at teir vilja hava Jákup ordiliga kláran, áðrenn teir senda hann í dyst aftur. Harafturat er Marcin Dawid ivasamur til dystin, men Tróndur Vatnhamar hevur tó víst seg sum ein góðan avloysara hjá honum.

Sjálvt um tey nógvu stigini ikki er komin á kontoina síðstu dystirnar, so er Páll Mohr Joensen hjá HB tó ikki so ónøgdur við gongdina síðstu dystirnar.

- Tað hevur gingið væl hjá okkum síðstu dystirnar í mun til fyrr í ár. Í fleiri dystum hava vit klárað at hildið málið reint, so eg haldi, at tað sær ljóst út.

Hann letur heldur ongan iva vera um, at teir ætla sær at vinna dystin ímóti AB.

- Vit kunnu so at siga staðfesta, at meistaraheitið er farið, men vit ætla tó at stríðast tað, ið eftir er av árinum, og vit ætla heilt víst at vinna dystin ímóti AB í kvøld.

HB og AB møtast í Gundadali í kvøld í fyrsta dystinum á nýggja undirlagnum, og her havi bæði liðini brúk fyri teimum trimum stigunum

Mynd: Álvur Haraldsen

AB vantar eisini liðskiparan

Tað er ikki bara HB, sum vantar sín liðskiparan. Tað er eisini dyggur smeitur fyri AB, at Fróði Clementsen ikki verður tøkur til dystin. Hann hevur verið úti í nakrar vikur við einum skaða, sum hann fekk í landskappingardysti í Klaksvík fyrst í juli.

Annars sær gott út við fólki í AB til dystin ímóti HB, og venjarin, Sigfríður Clementsen, sigur, at teir fara eftir sigrinum í Gundadali.

- Ja, vit fara heilt víst eftir teimum trimum stigunum í Gundadali. Vit liggja jú niðan fyri niðurflytingarstrikuna, so vit skulu hava stig.

KÍ-kvinnurnar í eldin hósdagin

Hósdagin skulu KÍ-kvinnurnar í eldin í UEFA-kappingini hjá kvinnum, sum í ár verður leikt í Føroyum

FÓTBÓLTUR

Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Nú er ikki long tíð, til kvinnurnar hjá KÍ aftur skulu royna seg í evropeiskum fótbólti. Hósdagin skulu tær nevniliga í dyst ímóti hollendska Den Haag, meðan hini liðini í bólkinum hjá KÍ eru Valur úr Íslandi og FC Honka úr Finnlandi.

UEFA kappingin, sum KÍ tekur lut í í ár, verður leikt í Føroyum, og í annaðkvøld kemur fyrsta liðið til landið, tá íslendska Valur lendir í Vágum. Mikudagin koma so hini bæði liðini.

Undan kappingini hevur KÍ gjørt eina roynd at fáa dystirnar leiktar í Klaksvík, men hetta hava útlendsku liðini ikki gingið við til. So sum tað sær út nú, so vera allir dystirnir leiktir á Svangaskarði uttan síðsti dysturin millum KÍ og FC Honka. Hann skal ætlandi leikast á Tórsvølli, men KÍ fera at gera eina síðstu roynd fyri at yvirtala finska meistaraliðið at leika dystin í Klaksvík.

Skráin er annars henda:

Hósdagin 9. august
kl. 14:00 Valur - FC Honka
kl. 19:00 Den Haag - KÍ

Leygardagin 11. august
kl. 11:00 FC Honka - Den Haag
kl. 14:45 Valur - KÍ

Týsdagin 14. august
kl. 16:00 Den Haag – Valur

Týsdagin 14. august
kl. 16:00 KÍ - FC Honka